

*Hóast SEV hevur tikið eini 40% av áarvatninum, sum rann oman í Funningsfjørð, er ikki líkt til, at hetta hevur havt nakra serliga ávirkan á botndjór og vøkstur fram við sjóvarmálanum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Minkaða útskiftingin á Funningsfirði ávirkar týðiliga gróðurin

**Líkt er tó ikki til, at Eiði 3 verkætlanin hjá SEV hevur havt árin á botndjór, evnafrøðilig viðurskifti á botni og vøksturin fram við sjóvarmálanum á Funningsfirði**

ÁRINSKANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Arbeiðsbólkurin, sum SEV setti at kanna árinini á Funningsfjørð, sigur, at síðan 2001 eru umleið 40% av áarvatninum, sum áður rann í innasta part partin av Funningsfirði, tikið til streymframleiðslu.

- Vit hava kannað árinini av hesum inntrivi á fjørðin í fýra pørtum, nevniliga 1) rák og útskifting, 2) gróður og oksygen, 3) botndýr og botnviðurskifti og 4) vøkstur í sjóvarmálanum.

## Minni útskifting

Arbeiðsbólkurin sigur í síni niðurstøðu, at útskiftingin av vatninum á Funningsfirði er minkað nakað, og at gróðurin er øktur týðiliga summi ár, men lítið onnur ár. Hinvegin eru nøgdirnar av oksygeni í sjónum so gott sum ikki ávirkaðar – og eygleiðingar higartil hava ikki kunnað staðfest broytingar á botni ella í sjóvarmálanum.

- Ávirkanin er størst innarlaga á Funningsfirði, og í miðal er útskiftingin av sjógvi tvørtur um grynnuna minkað við 11-14%, men saltinnihaldið í fjørðinum er tó ikki ávirkað stórvegis.

Arbeiðsbólkurin sigur, at minkaða útskiftingin ávirkar týðiliga gróðurin – ella framleiðsluna av plantuplankton í fjørðinum.

- Tó er ávirkanin skiftandi og er størst tey árini, tá ið nógv tøðevni er á landgrunninum.

Víst verður á, at eitt miðal ár til veður, kann árligi gróðurin økjast eini 18%, tá ið nógv tøðevni er á landgrunninum – og við eini 7%, um lítið er av tøðevnum.

- Sum vera man, er ávirkanin størst um summarið. Í juli kann gróðurin í innasta parti av fjørðinum økjast eini 27%, um nógv tøðevni rekur inn – og upp til eini 18%, um lítið er av tøðsøltum í sjónum, sum rekur inn.

Arbeiðsbólkurin sigur, at ávirkanin longri úti á Funningsfirði er minni.

## Ikki endaligt

Tey fimm í arbeiðsbólkinum við Eilifi Gaard, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni sum samskiparа, vísa á, at botndjór, evnafrøðilig viðurskifti á botni og vøkstur fram við sjóvarmálanum er kannað í 2001, 2002 og 2003.

- Hesar kanningar benda ikki á broytingar, sum hava samband við Eiði 3 inntrivi, sum tikið verður til.

Men, sigur arbeiðsbólkurin at enda í niðurstøðuni:

- Fyri at kanna eftir, um ávirkan kann standast av tøkuni av umleið 40% av vatninum yvir longri tíð, verða hesar kanningar endurtiknar í ár – og sostatt verða endaligu niðurstøðurnar um botnin og lívið fram við sjóvarmálanum gjørdar, tá ið úrslitini frá hesum kanningum eru tøkar, siga tey fimm í arbeiðsbólkinum, sum SEV setti at kanna árinini av vatnorkuútbygginini.

Funningsfjørður:

# Skiftandi veður

**- Nógvar mátingar skulu til, bæði fyri og eftir inntrivið fyri at kunna ávísa møguligar broytingar av minkaða áarvatninum á Funningsfirði, sigur arbeiðsbólkurin, sum hevur tikið saman um tøka kanningartilfarið og nú hevur gjørt eina heildarlýsing av støðuni á Funningsfirði**

ÁRINSKANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Í loyvinum frá Yvirfriðingarnevndini til SEV at gera nýtslu av einum parti av áarvatninum á Funningsfirði í sambandi við Eiði 3 verkætlanina, álegði Yvirfriðingarnevndin í 1983 elfelagnum at skipa fyri lívfrøðiligum kanningum á Funningsfirði.

18 ár eftir, at SEV fekk álagt at skipa fyri hesum kanningum, setti felagið í 2001 ein arbeiðsbólk at standa fyri hesum arbeiði.

## Í fýra pørtum

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var í fýra pørtum, 1) at finna fram til egnað felag/ stovn at gera kanningina, 2) saman við hesum at nágreina uppgávuna og finna fram til tíðar-og peningatørv, 3) at fylgja við, meðan kanningin verður gjørd og meta um ávegis úrslit og 4) at viðgera og meta um endaligu úrslitini, áðrenn frágreiðingin verður latin SEV.

Í arbeiðsbólkin vórðu vald; Henning Jacobsen (SEV), Signar P. Heinesen (Landsverk, seinni sp/f Data Quality), Eilif Gaard (Fiskirannsóknarstovan), Maria Gunnleivsdóttir Hansen (Heilsufrøðiliga Starvsstovan), Jan Sørensen (Havlívfrøðiliga Royndarstøðin, Kaldbak, fram til febr. 2003) og Eyðfinn Magnussen (Fróðskaparsetur Føroya, síðan mars 2003).

Bólkurin hevði sín fyrsta

